Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 02-03-2021
Mál nr.: 20/01994

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at seta úr gildi Lov sigtende til at lette Udarbejdelsen af nye Skøde- og Panteregistre på Færøerne

Lov nr. 81 frá 5. mai 1905 sigtende til at lette Udarbejdelsen af nye Skøde- og Panteregistre på Færøerne verður sett úr gildi.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Lógaruppskotið hevur til endamáls at seta úr gildi gamla lóggávu, sum hevur tænt fyri seg og er óneyðug í dag. Fyri at tryggja eitt so greitt og gjøgnumskygt lógarverk sum gjørligt er umráðandi, at óneyðug og óviðkomandi lóggáva verður sett úr gildi.

Yvirskipaða endamálið er at gera føroyska lógarverkið meira einfalt til frama fyri bæði borgarar og myndugleikar.

Ítøkiliga setur lógaruppskotið úr gildi *lov nr. 81 frá 5. mai 1905 sigtende til at lette Udarbejdelsen af nye Skøde- og Panteregistre på Færøerne, som ændret ved lov nr. 51 af 26. marts 1909.* Lógin hevði til endamáls at tryggja og skunda undir at fullfíggja skráirnar viðvíkjandi skeytum og veðbrøvum. Lógin frá 1905 kom ístaðin fyri *lov nr. 33 af 11. marts 1892*. Báðar lógirnar eru settar í gildi í teirri tíðini Føroyar vóru eitt amt í danska kongaríkinum, og orsøkin til at lógin frá 1892 sá dagsins ljós var millum annað, at tær skráir, sum vóru í 1892, vóru ófullfíggjaðar og samsvaraðu ikki altíð við veruligu ognarviðurskiftini.

Orsøkin til, at ein nýggj lóg kom í 1905, var m.a. fyri at skunda undir og lætta um arbeiðið við at gera skráirnar lidnar. Í lógini var m.a. ásett, at tað innan eina ávísa freist varð ókeypis hjá borgarum at fáa ein ognardóm, um vísast kundi á neyðugar upplýsingar um, at viðkomandi átti ognina. Í 1909 varð lógin broytt millum annað fyri at leingja um freistina, og tað kundi ikki væntast, at arbeiðið at fáa fullfíggjaðar skráir varð liðugt innan ásettu freistina.

Í 1962 samtykti Løgtingið uppskot til løgtingslógir um ávikavist tinglýsing (ll. nr. 55 frá 16. august 1962) og um matrikulering og sundurbýti av jørð (ll. nr. 64 frá 11. desember 1962). Eitt endamál við matrikullógini er, at allir fastir eigindómar í Føroyum verða matrikuleraðir, og saman við tinglýsingarlógini skuldi høvi verið til at fingið eina álítandi tinglýsingarskipan í lag.

§ 50, stk. 3 í tinglýsingarlógini ásetti, at *tey higartil nýttu realregistur til skeyta- og pantibøkurnar skulu verða nýttar sum tingbøkur, tá ið henda lóg er komin í gildi, soleiðis at rættarstøðan teirra tinglýstu rættinda sínámillum verður avgjørd eftir útgávudegnum, møguliga tinglýsingardegnum.* Við løgtingslóg nr. 59 frá 10. mai 2000 um broyting í tinglýsingarlógini varð § 50 umorðað. Endamálið við broytingini var at nútímansgera tinglýsingarverkið og umleggja tingbókina til edv. Í galdandi tinglýsingarlóg finst ikki orðing sum í § 50, stk. 3 áðrenn broytingina í 2000. § 52, stk. 3, ásetur tó, at *pantibrøv, sum geva pant í føstum eigindómi, og sum er tinglýst, áðrenn henda lóg er komin í gildi, hava hóast §§ 40 og 41, framvegis ta rættarstøðu, tey høvdu eftir higartil galdandi rætti, so leingi endurnýgging ikki er framd.*

Domstolsstyrelsen í Danmark sat fyri tinglýsingini fram til 1. februar 2006 og síðan 1. juni 2007 hevur tinglýsingin verið ein partur av Umhvørvisstovuni. Í dag er øll matrikulering av Føroyum liðug, og rættindi yvir fasta ogn skulu tinglýsast í tinglýsingini hjá Umhvørvisstovuni fyri at verða galdandi fyri avtalur um ognina og rættarsókn.

Mett verður, at lov sigtende til at lette Udarbejdelsen af nye Skøde- og Panteregistre på Færøerne hevur tænt fyri seg og er óneyðug í dag.

1.2. Galdandi lóggáva
Víst verður til *Pkt. 1.1. Orsakir til uppskotið.*

1.3. Endamálið við uppskotinum
Uppskotið setur úr gildi lov nr. 81 fra 5. mai 1908 sigtende til at lette Udarbejdelsen af nye Skøde- og Panteregistre på Færøerne, som ændret ved lov nr. 51 af 26. marts 1909.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Uppskotið setur úr gildi eina gamla lóg, sum ikki longur er viðkomandi. Víst verður til *Pkt. 1.1. Orsakir til uppskotið.*

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Umhvørvisstovuni og Føroya Rætti. Hvørki Umhvørvisstovan ella Føroya Rættur hava viðmerkingar til lógaruppskotið. Lógaruppskotið hevur eisini ligið alment til ummælis á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Fyri landið hevur lógaruppskotið ta umsitingarligu avleiðing, at samlaða lógarverkið í Føroyum gerst einfaldari. Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávís øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingin viðkomandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður ikki, at lógaruppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Lov nr. 81 frá 5. mai 1905 sigtende til at lette Udarbejdelsen af nye Skøde- og Panteregistre på Færøerne hevur havt til endamáls at lætta um og skunda undir at fáa fullfíggjaðar skráir viðvíkjandi skeytum og veðbrøvum. Mett verður, at lógin er óneyðug í dag.

Til § 2
Áseting um gildiskomu. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 2. mars 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen